Um eitt ár eru pengarnir uppi

Henrik Andersen er triði leiðarin á Margarinfarbrikkini í tvey ár, men hann hevur góðar vónir um betri arbeiðasumstøður. Bæði Elin Lindenskov, formaður í Sosialunevnd, og Klæmint Olsen, formaður í mentamálanevndini, vilja viðgerða málið við vælvild

ÁKI BERTHOLDSEN

– Um eitt ár eru pengarnir uppi. Og skal skal ungdómurin í Havn hava eitt tilhaldsstað aftaná tað, skal kommunan spýta heilt fitt av pengum í kassan.

Sigur Eyðun Jensen limur í húsaráðnum fyri Margarinfabrikkina.

Margarinfabrikkin, sum í eina tíð hevur verið tilhaldsstað fyri ung í Havn, hevur fingið nýggjan leiðara.

Men tað er ein stórur spurningurin um hann ikki verður arbeiðsleysur aftur longu komandi ár.

Tí tá er eingin at betala longur so at hon kann halda fram.

Ikki uttan so, at kommunan tekur um endan.

– Í mínari verð er tað heilt greitt, at skal Margarinfabrikkin halda fram sum tilhaldsstað hjá teimum ungu í havn, skal kommunan, skal kommunan leggja fitt av pengum út, sigur Eyðun Jensen.

Hann sigur, at í løtuni er tað Barnabati í Norðurlondum, sum betalir lønina hjá leiðaranum.

– Men tað hevur barnabati bara játtað í trý ár, og tað tríárskeiðið gongur út komandi summar.

Afturat játtanini til leiðaran, hevur kommunan játtað eitt sindur til raksturin, higartil hevur tað verið 50.000 um árið, men í ár er stuðulin 100.000 krónur.

– Men skal Margarinfabrikkin halda fram eftir komandi summar, er tað greitt, at kommunan má átaka sær allar útreiðslurnar, sigur Eyðun Jensen.

Tað hevur gingið strilti at fingið leiðarar at støðast á margarinfabrikkini. Hóast hon bara er tvey ára gamal, er nýsetti leiðarin longu tann triði í røðini.

Eyðun Jensen ivast ikki í, at orsøkin er, at so lítlir pengar eru at arbeiða við.

– Tað mugu verða fleiri lønt støðv í fabrikkini. Tað gongur ikki at dúva uppá sjálvbodna arbeiðsmegi og at leiðarin skal verða einasta lønta fólki.

Eyðun Jensen sigur, at av tí, at fíggjarkarmurin altið hevur so vánaligur, er Margarinfabrikkin ongantíð blivin tað, hon varð ætlað til.

M.a. hevur tað ongantíð riggað at gera hana til eitt tilhaldstað hjá børnum eftir skúlatíð.

Harafturat skerst ikki burtur, at hon hevur fingið eitt heldur ivasamt orð á sær sum tilhaldsstað hjá einum parti av ungdóminum, sum annar ungdómur ikki vil vera saman við, eftir hvat tey ungu siga.

Eyðun Jensen sigur, at tað átti at verið minst tvey lønt fólk á Margarinfabrikkini, afturat leiðaranum.

– Fáast karmarnir ikki í fasta, trygga legu, so at innihaldið verður øðrvísi, verður tað ikki frægari. Tí ikki fyrrren tá fáa foreldur tað álit á Margarinfabrikkina, sum skal til, fyri at tey eisini fáa hug at verða virkin í arbeiðnum m.a. ígjøgnum ein foreldrabólk.

Eigur at bera til

Nýggi leiðarin á Margarin fabrikkini eitur Henrik Andersen. hann er dani, men giftur til Føroyar, higar hann flutti fyri einum ári síðani. Hann er lærari og hevur royndir frá ungdómsarbeiði í Danmark.

Sjálvur hevur hann verið sjálvboðin á Margarinfabrikkini teir seinastu mánaðirnar.

Hann hevur álit á, at býráðið er sinnað at fáa fabrikkina til eitt veruligt, trygt tilhaldsstað hjá teimum ungu

Hann sigur, at tær ábendingar, hann hevur fingið frá býráðnum, eru, at býráðið er sinnað at játtað meiri pengar til lønt fólk.

Hinvegin heldur nýsetti leiðarin, at tað ber ikki til at dúva uppá sjálvbodna arbeiðsmegi.

Men nú 1. apríl fær hann eitt fólk afturat sær

Tað er eitt fólk, sum er í ALS, men sum fær møguleikan at fáa okkurt at gera. hetta fólkið fær ikki løn, men missur heldur ikki stuðulin frá ALS

–Tað var soleiðis eg sjálvur endaði á her niðri, sigur hann.

Annars heldur hann at alt ov lítið er gjørt fyri at finna aðrar fígging, enn hana, sum fæst úr kommunukassanum. M.a. heldur hann, at tað eigur at bera til at fáa stuðul frá ymsum grunnum.

Sjálvur heldur Henrik Andersen, at hetta er ein avbera spennandi avbjóðing ogh ann hevur álit á, at tað fer at bera til.

okkurt skal til

Elin Lindenskov, formaður í sosialu nevnd hjá býráðnum, sum hevur havt mest við margarinfabrikkina at gera, sigur, at býráðið má spurningurin um fabrikkini má takast upp nokk so skjótt.

Sjálv heldur hon, at býráðið átti at kent eina ábyrgd á sær at fingið hana at rigga, tí tað er ein stórur partur av ungdóminum, sum einki annað hevur at takast við í frítíðini, hevur hann ikki eitt tilboð sum hetta.

Hon sigur, at tað verður neyðugt við fleiri fólkið, fyri at fáa tað innihald og tað virksemi í fabrikkina, sum er neyðugt fyri at halda teimum ungu til.

Eg dugi ill at siggja, hvussu vit kunnu lata tað detta niðurfyri, ella kunnu fosvara ikki at gera tað ordiligt, sigur hon

Klæmint Olsen, formaður í mentanarnevndini, er eisini sinnaður at viðgera málið við vælvild í býráðnum.

Heldur ikki hann er nøgdur við umstøðurnar nú og heldur og heldur ikki, at fabrikkin kemur til sín rætt.

tíðindablaðið
SOSIALURIN
BOX 76 · 110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Ja!

*Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum – og fái blaðið **5 ferðir um vikuna.***

☐ Haldarar í Føroyum: 235,-/ársfj.
☐ Haldarar í Danmark: 425,-/ársfj.
☐ Haldarar í Danmark: (5 bl. í senn): 340,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir

Til ber altíð at gerast haldari og goldið verður bert fyri bløðini, ið eftir eru av ársfjórðinginum

Navn: .....
Bústaður: .....
.....
Postnr., bygd/býur: .....
.....
Tlf.: Undirskrift: .....

Klæmint Olsen heldur á við sakarmálinum ímóti SEV, hóast hann nú noyðast at gjalda alt sjálvur. Tvær ferðir hevur hann roynt at fáa frían rættargang, men tað fær hann ikki

Klæmint noyðist at gjalda sjálvur:

Leitar eftir sakførara

ÁKI BERTHOLDSEN

Klæmint Olsen, limur í umboðsráðnum hjá SEV, fekk ikki frían rættargang í sakarmálinum, hann hevur hevur lagt ímóti leiðsluni í SEV.

Hóast Klæmint Olsen royndi tvær ferðir at fáa frían rættargang, var tað til fánýtis.

Spurningurin var enntá hjá Fólkatingsins Umboðsmanni og vendi, men einki hjálpti.

Hildið verður ikki, at málið er nóg prinsipiel ella hevur nóg stóran almennan áhuga.

Nú var so inntøkumarkið eftir, men Klæmint Olsen sigur, niðurstøðan var ,at hann fær ov góða løn til at fáa frían rættargang

Gevst ikki

Men hann ætlar sær ikki at gevat fyri tað.

Klæmint Olsen sigur, at hóast hann nú noyðast at rinda sín egna sakarmálskostnað, ætlar han nat føra málið í rættinum.

Málið var fyri á rættarfundi í farnu viku, men tað varð ongantíð viðgjørt.

Dómarin helt, at málið var ikki nóg greitt og bað meg finna ein sakførara at føra málið fyri meg.

Og har liggur so málið í løtuni.

Klæmint Olsen sigur, at hóast tað verður dýrt, so leitar hann í løtuni eftir einum sakførara, sum vil átaka sær at føra sakina fyri hann.

Hann sigur, at hann skal helst hava funnið sakføraran fyri 1. apríl, annars er fryktandi fyri, at málið dettur niðurfyri.

Ólógligt húsakeyp

Tað, sum fekk Klæmint Olsen at leggja sak ímoti leiðsluni í SEV, var, at SEV keypti grannskoðarahúsið hjá Jógvan Sundstein við Marknagilsvegin til skrivstovubygning.

Klæmint Olsen heldur uppá, at fundurin, har keypið varð góðkent, var ólógligur.

Men sakin fevnir eisini um fleiri aðrar fundir hjá umboðsráðnum. Hann sigur, at tað hava verið mál, hann hevur viljað fingið til viðgerðar, men tað er noktað honum.

Hann hevur heldur ikki fingið mál til atvøðugreiðslu.hann hevur biðið um, m.a ein misálitisváttan. Øll hesi málini eru nú eisini komin uppá hetta sakarmálið, sum verður bæði drúgt og fløkt.